## Fleiri ferðafólk um flogvøllin

**Tað komu og fóru heldur fleiri ferðafólk um flogvøllin í Vágum í januar í ár, enn sama mánað í fjør. Eisini posturin var meira, meðan farmurin minkaði**

FLOGFERÐSLA

Tað ferðaðust 9.240 ferðafólk um flogvøllin í Vágum í januar í ár. Í januar í fjør vóru tey 9.039 ferðafólk. Tað vil siga, at vøksturin í ár var 2,2 prosent.

Nógv teir flestu útlendingarnir, sum fóru um flogvøllin, vóru danir. Teir vóru gott trýtúsund í tali. Hálvttriðjahundrað íslendingar og knappliga tveyhundrað bretar fóru um flogvøllin. Nakrir heilt fáir norðmenn vóru eisini, meðan einki var av fólki aðrastaðni úr heiminum, siga hagtølini hjá Statens Luftfartsvæsen.

Tað komu og fóru flogfør og tyrlur 327 ferðir um flogvøllin í januar í ár í móti 368 ferðum í fjør. Tað er ein minking upp á 11,2 prosent.

Farmurin minkaði eisini. Átta prosent minni varð ført av farmi um flogvøllin í januiar í ár, enn í januar 2002.

Men hinvegin er posturin vaksin. 52,1 tons av posti vórðu flutt um flogvøllin í Vágum í januar 2003. Tað er 2,6 prosent meira enn tey 50,8 tonsini, sum fóru um flogvøllin í januar 2002, siga hagtølini.

ej



*Hóast jólagestirnir eru farnir av aftur landinum, og hálka eisini hevur verið part av farna mánaðinum, koyra nógvir bilar gjøgnum Vágatunnilin. Meðaltalið liggur um 700 bilar um samdøgurið, og tá mest hevur verið ein fríggjadag, hava teir verið upp móti 900*

*Mynd - Jens Kristian Vang*

# Nógvir bilar gjøgnum Vágatunnilin

**Seinastu tølini hjá P/F Vágatunlinum vísa, at tað koyra umleið 700 bilar gjøgnum tunnilin um samgøgurði. Tað er væl meira, enn leiðslan roknaði við, tá tunnilin lat upp**

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Nú januar mánaði er farin, vísa tølini hjá Vágatunlinum, at umleið 700 bilar dagliga koyra gjøgnum tunnilin. Eisini hóast tunnilin hevur verið stongdur meginpartin av náttini, og hálka hevur verið part av tíðini. Tó hoyrir við til uppgerðina, at goldið verður bara annan vegin.

Hóast vanliga hevur verið væntað, at januar fór at vera millum slakaru mánarnar til ferðslu, eru nógv, sum brúka Vágatunnilin. Eisini aftan á, at nýggjársferðslan um flogvøllin, tá nógv fólk fóru av aftur landinum eftir jólafrí í Føroyum, er liðug, er væl meira ferðsla gjøgnum tunnilin, enn leiðslan fyri Vágatunlinum roknaði við, áðrenn latið varð upp.

Gjaldskipanini hjá teimum, sum ikki hava kubba, riggar ikki enn. Tey mugu vænta at skula bíða einar fjúrtan dagar afturat, til tey sleppa at gjalda við korti við gjaldstøðina.

Trupulleikin er, greiðir Dávur Reinert Hansen, stjóri í P/F Vágatunlinum frá, at sjálv tekniska skipanin er norsk, men gjaldast skal eftir danskari skipan.

Í Noreg er tað so, at har fær skipanin dagliga ein lista við teimum kortum, sum eru ógildað, og kannar so hann, tá goldið verður. Hjá PBS í Danmark, sum umsitir gjaldingina hjá Vágatunlinum, er tað hinvegin soleiðis, at tað einstaka kortið skal kannast, hvørja ferð, goldið verður. Og hesum hava norðmenninir, sum hava gjørt skipanina, ikki tikið hædd fyri.

Teir hava nú arbeitt við at gera eina nýggja ella tillagaða skipan og koma hendanveg um eina tvær vikur at seta hana upp og royna hana, sigur Dávur Reinert Hansen, sum vónar, at gjaldskipanin við Vágatunnilin tá fer at rigga til fulnar.

### Arbeiða í tunlinum

Ferðslan kann møguliga hava verið eitt sindur darvað av, at arbeitt hevur verið í tunlinum um næturnar í seinastuni. Tað ger, at stongt er frá klokkan sjey á kvøldi til seks um morgunin. Tó er gjørligt hvønn heilan tíma at sleppa ígjøgnum. So skulu fólk í fyrsta lagi passa sær løgir at vera við tunnilsmunnarnar, tá tikið verður frá, og í øðrum lagi bíða utan fyri. Tað kann hava gjørt, at onkur er setstur aftur.

– Hendan skipanin hevur riggað væl, sigur Dávur Reinert Hansen. Fólk hava virt hesa skipanina til fulnar, sigur hann. Einasta var nú eitt kvøldið, tá í so nógvir bilar stóðu í rundkoyringini Leynamegin og bíðaðu. Men eftir at áheitan er komin frá leiðsluni um at flyta seg nærri Leynatunlinum at bíða, er tað eisini í lagi.

Tað elektriska er nú við at vera í lagi. Ljósini uttan fyri tunnilin lýsa, og útvarp og telefon hoyrast nú mestum allastaðni í tunlinum.

Væntandi verður tó stongt um náttina allan febriar mánað, tí okkurt annað smáting er at gera, sigur Dávur Reinert Hansen. So sum onkur dropi, sum dettur undan, loftinum og tílíkt, teir vilja sleppa av við.

### Kubbarnir

Einir 1.400 kubbar eru seldir, og allir eru latnir teimum, sum bíðað hava um. Eingin bíðlilisti er, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri í P/F Vágatunlinum. Hann sigur, at skipanin við kubbunum virkar, sum hon skal.

Bilar, sum hava kubba, ferðast ótarnaðir gjøgnum tunnilin. Tá komið verður til gjaldstøðina Vágamegin, lýsir ein grønur krossur, sum sigur, at bilurin er skrásettur, og gjald tikið av kubbanum. Tað er ikki neyðugt at minka ferðina fyri at verða skrásettur.

Skipanin sigur eisini sjálv frá, tá tíð aftur er at fylla á kubban. Tá lýsir ikki grønt men gult.

– Men tað er kortini rættiliga skilagott sjálvur at fylgja við, hvussu nógv eftir er, til fyllast skal á aftur, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri í P/F Vágatunlinum.



# 5 trolarar landaðu í Saltangará

**Á virkinum hjá Fiskavirking í Saltangará hava tey nú tikið nýggju hølini, sum bygd eru suður úr verandi virki, í nýtslu**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Nýggi parturin av virkinum hjá Fiskavirking í Saltangará er nú tikin í nýtslu. Hetta er tann lági parturin, sum sæst bygdur úr "kvistinum". Seinni í ár er ætlandi eisini at framleiða portiónir til útflutnings.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Saltangará:** Í seinastu viku landaðu fimm trolarar til Fiskavirking í Saltangará.

Lemmatrolarin, Vesturvarði, var týsdagin við stívliga 130.000 pundum, Jaspis og Ametyst mikudagin við góðum 200.000 pundum, og hósdagin í seinastu viku vóru Smaragd og Safir við 160.000 pundum. At kalla øll veiðan hjá skipunum var upsi.

Jason Johannesen, virkisleiðari, sigur, at fiskurin hjá Jaspis og Ametyst var ógvuliga smáur, eini 60% 4'arar. Veiðan hjá Smaragd og Safir var eisini smáttfallandi. Lemmatrolarin, Vesturvarði, hevði hinvegin hampiliga góðan upsa.

### Nýggj høli, gamlar linjur

Á virkinum hjá Fiskavirking í Saltangará hava tey nú tikið nýggju hølini, sum bygd eru suður úr verandi virki, í nýtslu.

Skerilinjurnar eru fluttar suður; tær eru nú 5 í tali mótvegis teimum 6, sum vóru inni á gamla virkinum.

Sum oftast, koyra tvær linjur í senn - alt eftir, hvussu stórur ella smáur fiskurin er, sum virkið keypir.

Jason Johannesen sigur, at skerikapasiteturin er hin sami sum áður.

- Men einaferð seinni i ár fáa vit tvær nýggjar flowskerilinjur, og tá kann væntast, at umstøðurnar verða nakað betri.

- Verandi skerimaskinur á virkinum hjá Fiskavirking í Saltangará eru gamlar, sigur virkisleiðarin.

## Trolarar eystan fyri hava rokfiskiskap

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Verksmiðjutrolarin, Akraberg, loysti úr Føroyum, 14. januar, og legði leiðina uppí Barentshavið. Saman við hinum verksmiðjutrolarunum, Sundabergi, Vesturvón og Ennibergi, hevur Akraberg havt góðan fiskiskap, síðan teir komu á fiskileið.

Anfinn Olsen, reiðari, sigur, at fiskiskapurin hesa tíðina hevur ligið millum 15 og 20 tons í flaki um samdøgnið, og tað er rokfiskiskapur.

Fiskurin, sum skipini hava fingið, hevur eisini verið góður toskur.

### Lítil kvota

- Eg haldi, skipini fingu nógvan fisk har uppi, longu áðrenn Akraberg kom í Barentshavið.

Anfinn Olsen sigur, at Akraberg verður skjótt liðugur við norsku kvotuna, og tá kann hugsast, at farið verður antin í russiskan sjógv ella upp til Svalbards at royna.

Eyðun á Bergi er skipari við Akrabergi.



*Seinastu tíðina hevur Akraberg fingið 15-20 tons í flaki um samdøgnið. - Hetta er rokfiskiskapur, sigur reiðarin, Anfinn Olsen*

# Loysir helst seinni í vikuni

**- Hóast tað hevur gingið eitt vet niður eftir hjá nótavinnuni í seinastuni, hava vit hampiliga góðar vónir, sigur reiðarin á Høgabergi, Anfinn Olsen**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Nýggi nótabáturin hjá EM-Shipping, Høgaberg, sum kom á Fuglafjørð úr Noregi seinasta leygardag, fer væntandi til fiskiskap seinni í hesi vikuni.

Anfinn Olsen, reiðari, sigur, at Skipasýnið er í ferð við at gjøgnumganga skipið, og tá ið øll viðurskifti eru komin uppá pláss, verður loyst.

Hann væntar ikki, at neyðugt verður at fremja tær stóru ábøturnar, tí alt bendir á, at skipið er í góðum standi.

- Farið verður antin á lodnuveiði í íslendskum sjógvi ella á svartkjaftaveiði í ES-sjógvi.

Reiðarin sigur, at møguliga fer skipið at veiða lodnu til matna um einar 2-3 vikur.

- Men tað er ikki altíð, at marknaðurin fyri lodnu til matna er so góður. So, hetta avhongur av, hvussu marknaðurin verður, tá ið rognaprosentið í lodnuni verður størri.

Spurdur um vónirnar, nú felagið hevur keypt Høgaberg og selt Jón Sigurðsson, sigur Anfinn.

- Jú, eg haldi, vit hava hampiligar góðar vónir, hóast tað hevur gingið eitt vet niðureftir hjá nótavinnuni í seinastuni, sigur hann.

Høgaberg, sum er fyrrverandi Gullfinnur, hevur somu kvotu, sum hini føroysku nótaskipini hava, burtur sæð frá markelkvotuni; her er kvotan hjá Høgabergi 40% minni.

Við skipinum verða 13 mans, og skipari verður fuglfirðingurin, Jógvan Hentze, sum býr í Gøtu.

EM-Shipping, sum eigur Høgaberg, hevur 2/3 av partapeninginum í Føroyum og 1/3 í Íslandi.

### Keyptu felagið

Tað var seinnapartin í nítiárunum, at felagið, EM-Shipping, sum Gulak Madsen átti, varð lýst til sølu í bløðunum.

- Vit løgdu eitt boð inn og keyptu felagið, sigur Anfinn Olsen.

Hann vísir á, at Jón Sigurðsson og nú Høgaberg hevur kvoturættindini hjá nótaskipinum, Skálafossi og Ester, sum EM-Shipping átti. Hesi stava heilt aftur til Leiv Hepna.

Skálafossur hevur eisini havt navnið, Havlot og seinni Ruth.



*Ætlandi fer Høgaberg til fiskiskap seinni í hesi vikuni, men fyrst fer Skipaeftirlitið at gjøgnumganga skipið.*

*Mynd: Torleif Johannesen*